Føroya Arbeiðarafelag boykottar virki í Lopra

– Eigarin rennur undan trupulleikunum alla tíðina og nú er tolið uppi, sigur Ingeborg Vinther

BOYKOTT
Áki Bertholdsen

Eitt fiskavirki, sum ætlanin var at seta á stovn í Lopra, hevur fingið tað ringast hugsandi byrjanina. Tí longu áðrenn fyrsti sterturin er virkaður, hevur landsins størsta fakfelag, Føroya Arbeiðarafelag, gjørt at boykotta virkið.

Føroya arbeiðarafelag hevur gjørt av at nokta limum sínum at hava nakað sum helst við virkið at gera. Sostatt kunnu limir í Føroya Arbeiðarafelag t.d. ikki avgreiða fisk, sum hetta virkið keypir á uppboðssøluni, hvørki at fáa fiskin av uppboðssøluni, ella lossa, ella koyra, ella nakað annað.

Og undir slíkum umstødum, verður tað ómetaliga trupult, fyri ikki at siga heilt ómøguligt hjá virkinum at fáa nakran fisk at arbeiða.

Ætlanin var at seta eitt nýtt fiskavirki á Stovn í Lopra. Men virkið fekk so ringa byrjan, sum hugsast kundi

Rýmir undan

Talan er um fiskavirkið Viking Fisk, sum Hendrik Tausen hevur.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at viðurskiftini hjá hesum virkinum eru so ógreið, at tiltøk verða sett í verk ímóti til, tí viðurskiftini eru fingin í rættlag aftur.

– Virkið hevur flutt fleiri ferðir. Fyrst var tað í Vík, síðani í Fuglafirði og seinast var tað í Oyndafirði, áðrenn tað nú er flutt suður til Lopra. Samstundis hevur hann skift partafelag einar fýra, fimm ferðir.

Ingeborg Vinther sigur, at allastaðni, har virkið hevur verið, hevur arbeiðarafelagið havt stórar trupulleikar at fáa eigaran at røkja síni viðurskifti, eitt nú at gjalda limagjald, eftirlønargjald og lívstrygging.

– Vit hava havt stríð av honum alla tíðina. Hann vil ikki røkja sínar skyldur, fyrrenn hann er trýstur til tað. Og hvørja ferð trupulleikarnir á einum stað hópa seg nóg nógv upp, stingur hann av og flytir onkra aðrastaðni.

– Hann er heldur ikki limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

– Ein trupulleiki er eisini, at hesin arbeiðsgevarin hevur einar 10-15 teilendingar í arbeiði.

Men Ingeborg Vinther sigur, at Føroya Arbeiðarafelag vil eisini hava prógv fyri, at hesi fólkini fáa í løn.

– Vit hava fingið kærur um, at tey fáa ikki meiri enn 30 krónur um tíman. Men tað er vónleyst at fáa at váttan fyri, at tey fáa sáttmálaásettu tímaløntna. Vit hava ikki sæð ein einasta tímaseðil og vit sleppa heldur ikki í samband við sjálvt arbeiðsfólkið.

– Nú er tolið uppi og tí hava vit steðgað arbeiðsplássinum.

Ingeborg Vinther sigur, at tiltakið ímóti arbeiðsplássinum, verða ikki avblást, fyrrenn Føroya Arbeiðarafelag hevur fingið trygd fyri, at arbeiðsgevarin ætlar at røkja sínar skyldur, mótvegis fakfelagunum og at hann rindar arbeiðsfólkinum lønina, sum er ásett í sáttmálanum

Sambært útvarpinum, hevur heilsufrøðiliga Starvsstovan eisini havt trupulleikar av sama arbeiðsgevara. Eitt nú var tað komið so langt, at Starvsstovan gav einaferð boð um at steingja virkið hjá honum, tí tað gekk so illa at fáa hann at lúka treytirnar í matvørulógini.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fatur á manninum, men við útvarpið vísti hann kærunum frá Føroya Arbeiðarafelag frá sær og hann segði samstundis, at tær fáa lønina, sum er ásett í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Orsøkin til, at hann hevur teilendingar í arbeiði er, at føroyskt arbeiðsfólk var ikki at fáa, táið hann byrjaði virkið í Oyndafirði.

Øll fiskiloyvini enda í Havn og á Skálafirði

Fær Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri,undirtøku fyri ætlanum sínum at geva vinnulívsfólkum fríari ræsur at keypa og selja fiskirættindi, fara øll fiskiloyvini at enda í Havn og á Skálafirði, sigur ein annar fólkafloksmaður, Jóanis Nielsen

MIÐSAVNING
Áki Bertholdsen

– Hetta verður uttan iva ein fyrimunur fyri hvønn einstakan reiðara. Men fyri landið verður tað ein stórur vandi.

Jóanis Nielsen, løgtingsmaður fyri fólkaflokkin, er hart ímóti ætlanunum hjá partamanninum, Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharra á fiskivinnuøkinum.

Fyrr í vikuni legði Jørgen Niclasen eina frágreiðing fram, har hann stingur út í kortið, hvussu tann fødi fiskivinnupolitikkurin skal vera framtyvir.

Eitt nú heldur hann, at tað hevur stóran týðning fyri fiskivinnuna, at reiðarar fáa so fult frælsi sum gjørligt at keypa og selja fiskirættindi. Hetta skal vera galdandi fyri skip og bátar heilt niður í 15 tons.

Fiskivinnupolitikkurin hjá Jørgen Niclasen er ein fyrimunur fyri hvønn einstakan reiðara, men fyri landið er tað ein stórur vansi, sigur partamaður hansara, Jóanis Nielsen, tingmaður úr Vágum fyri fólkaflokkin

Onkrar einstakar avmarkingar skulu tó vera, eitt nú skal ongin einstakur reiðari kunna eiga meiri enn ein ávísan prosentpart av fiskirættindunum.

Partamaðurin ósamdur

Men tað er longu nú greitt, at fiskimálaráðharrin hevur ikki fulla undirtøku fyri ætlanum sínum.

Heldur ikki í fólkaflokkinum er semja um hesa kósina í fiskivinnupolitikkinum.

Ein, sum er avgjørdur ímóti ætlanunum hjá Jørgen Niclasen, er sjálvur varamaður hansara á tingi, Jóanis Nielsen, løgtingsmaður úr Sandavági.

– Fær Jørgen Niclasen viðhald fyri sínum ætlanum, verður endin tann, at øll fiskiloyvini í Føroyum enda í Havn og á Skálafjørðinum, sigur Jóanis Nielsen.

Hann heldur, at tað einasta rætta hevði verið at býtt fiskiloyvini út á øki, so at hvørt øki í landinum skal hava rætt til eitt ávíst tal av fiskiloyvum.

Hann heldur, at skulu vit tosa um økismenning, hevur tað alstóran týðning, at útjaðarin varðveitir arbeiðsplássini í fiskivinnuni, tí tað vísir seg at vera í hvussu so er at vera ómetaliga trupult at flyta onnur arbeiðspláss út um landið.

– Tað ræður um at varðveita arbeiðsplássini í fiskivinnuni úti um landið – og so at fáa nøkur afturat flutt úr miðstaðarøkinum, út á bygd.

– Men skulu reiðarar hava fríar ræsur at keypa og selja fiskirættindi, fer tað í longdini at drena útjaðaran fyri fiskiloyvir so at øll fiskivinnan at enda verður miðsavnað í Havn og á Skálafjørðinum.

Jóanis Nielsen sigur, at orsøkin til tað er, at tað mesta ev pengunum er miðsavnað í Havn og rundanum Skálafjørðin.

– Tað er í hesum økjum, at fólk hava nógv tær hægstu inntøkurnar. Tað vísa hagtølini svart upp á hvítt. Og av tí sama fara fólk í útjaðaranum ikki at formáa sær nógv ímóti fólkinum í miðstaðarøkinum í kappingini um at keypa fiskirættindi.

Gongdin eyðsæð

Fólkafloksmaðurin í Vágum heldur somuleiðis, at tann sannroynd, at uppboðssølan er á Toftum, fer eisini at stuðla uppundir tað gongd, at verður tað givið leyst at keypa og selja fiskirættindi, fer tað at loysa seg best at miðsavna fiskivinnuna rundanum uppboðssøluna, heldur enn at føra fisk út um landið at verða arbeiddan.

– Men eg dugi væl at síggja, at fríar ræsur at keypa og selja kvotur kann vera ein stórur fyrimunur hjá tí einstaka reiðaranum.

– Hinvegin dugi eg eisini at síggja, at fyri samfelagið sum heild, verður tað ein stórur vansi.

Hann sigur, at hesi seinastu árini hevur gongdin verið tann, at fiskiloyvi eru flutt frá útjaðaranum, inn ímóti miðstaðarøkinum.

So vítt hann minnist, vóru eini sjey fiskiloyvi í Sandavági og Miðvági 15 árum síðani, at fáum árum síðani.

Nú eru bara tvey eftir. Og tað er hendan gongdin, sum má vendast, heldur sandavágsmaðurin.

Ikki umaftur

Fyri nøkrum árum síðani varð ein líkandi roynd gjørd at varðveita fiskivinnuna úti um landið.

Tað var táið ætlanin var at gera eitt ráfiskabýti, har hvørt øki í landinum skuldi fáa rætt til eitt ávíst tonsatal av tí fiski, sum varð fiskaður. Men tað datt skjótt niðurfyri aftur.

Jóanis Nielsen heldur ikki, at hetta, at býta fiskirættindi sundur ímillum økini, kann samanberast við ráfiskabýtið.

– Tað í lagi at kapping er um fiskin á landi, tí tað kann ongin ivi vera um, hvønn týðning uppboðssølan hevur havt fyri fiskaprísirnar.

– Hinvegin eigur hvørt øki at hava rætt til eitt ávíst tal av fiskilrættindum. Er tað so okkurt øki, sum ikki fær brúkt sína »kvotu« av fiskirættindum, er tað sjálvsagt væl hugsandi, at vinnulívsmenn úr øðrum økjum seta seg niður í tí økinum og leggja sítt virksemi har.

Jóanis Nielsen sigur, at hann fer at gera alla sína ávirkan galdandi fyri at ætlanin hjá Jørgen Niclasen ikki verður sett í verk.

– Tað skal fyrst og fremst gerast innanhýsis í fólkaflokkinum. Hvat úrslitið verður, veit eg ikki, men eg havi varhugan av, at eg eri ikki einsamallur í flokkinum um mína støðu, sigur løgtingsmaðurin úr Vágum.

– Eg eri heldur ikki meiri enn varamaður hjá Jørgen Niclasen, so tað kann vera so skjótt, at eg eri farin úr Løgtinginum aftur, leggur hann afturat.

POLITIKKUR & SAMFELAG

Meiriluti fyri sjálvsavgerðarrættinum

Javnaðarflokkurin tekur eftir viðgerð í uttanlandsnevndini undir við at staðfesta sjálvsavgerðarrætt Føroya fólks. Hetta ger til skammar pástandin hjá løgmanni, tá hann sýtti Høgna Hoydal at leggja slíkt uppskot fram, tí andstøðan fór at vera ímói

SJÁLVSTÝRI
John Johannessen

Fyri nøkrum vikum síðani hótti Anfinn Kallsberg, løgmaður, við at tveita Tjóðveldisflokkin úr samgonguni, tí Høgni Hoydal hevði borið eitt uppskot í tingið um at staðfesta sjálvsavgerðarrætt Føroya fólks.

Løgmaður segði tá, at hann vildi ikki hava eitt uppskot um nakað eins sjálvsagt, sum dagin í dag fyri tingið, so andstøðan kundi atkvøða ímóti tí. Anfinn Kallsberg vildi nevniliga ikki hava, at nakar kundi siga, at løgtingið ikki var samt um, at Føroya fólk hevur fullan sjálvsavgerðarrætt.

Men uppskotið kom kortini fyri tingið. Tó ikki sum sjálvstøðugt uppskot, men sum inngangur til uppskotið til samtyktar um sjálvstýri Føroya fólks.

Og júst hesum inngangínum tekur Janaðarflokkurin sum stórur partur av andstøðuni av fullum huga.

Tískil ber til at staðfesta, at grundgevingin móti Høgna Hoydal í stóra samgongustríðnum um sjálvstýrisleistin er gjørd til skammar av stórum parti av andstøðuni í álitinum hjá uttanlandsnevndini til uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks.

Løgtingið viðgjørdi í gjár, eftir at Sosialurin var prentaður, uppskotið til samtyktar fyri aðru ferð.

Útvarpið eigur at kunna um samferðslu

Upplýsingar um samferðslutrupulleikar eiga at vera partur av tíðindasendingunum í loftmiðlunum. Tað heldur Jógvan við Keldu, sum hevur sett Bjarna Djurholm skrivligan fyrispurning um hetta

FYRISPURNINGUR
John Johannessen

Tað eigur at verða álagt Strandfaraskipum Landsins saman við einum loftmiðli at kunna um samferðslutrupulleikar.

Hetta heldur Jógvan við Keldu, tingmaður fyri Fólkaflokkin.

Jógvan við Keldu hevur tí sett landsstýrismanninum í samferðslumálum, Bjarna Djurholm, skrivligan fyrispurning, har hann spyr, hvussu tað ber til, at upplýsingar um samferðslutrupulleikar hjá SL á sjógvi ikki eru ein partur av tíðindasendingunum í Útvarpi Føroya ella í Rás 2.

Í øðrum lagi spyr Jógvan við Keldu, um landsstýrismaðurin ætlar at taka hendan tátt upp við antin Útvarp Føroya ella Rás 2.

Jógvan við Keldu vísir á, at føroyska samferðslan á sjógvi tíðum verður óróg-vað av vánaligum verði, av breki ella onkrum øðrum. Og tí heldur hann tað vera átrokandi, at ein kundatænasta kemur at virka, so brúkarin av samferðslukervinum fær upplýsingar um møguligar ferðslutrupulleikar hvønn tíma, bæði í útvarpi og sjónvarpi. Eisini verður brotið inn í sendingar, um tað verður hildið neyðugt, tí ein ella annar trupulleiki brádliga hevur tikið seg upp, sigur Jógvan við Keldu í viðmerkingunum til fyrispurningin.

Jógvan við Keldu heldur, at um vit sammeta Føroyar í stødd við londini uttan um okkum, hava Føroyar helst tann mest vánaliga regularitetin og mest vánaligu upplýsingartænastuna.

Jenis krevur svar um hjúnabandslóg

FYRISPURNINGUR
John Johannessen

Jenis av Rana vil hava at vita frá ríkisumboðkvinnuni, nær hjúnabandslógin verður sett í gildi fyri Føroyar.

Løgtingið hevur samtykt ríkislógartimæli um at seta í gildi fyri Føroyar hjúnabandslógina, ella rættari »lov om ægteskabets indgåelse og opløsning«.

Jenis av Rana vísir í viðmerkingunum til fyrispurningin á, at hann áður hevur spurt ríkisumboðskvinnuna, hví lógin ikki enn var sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan. Tá svaraði ríkisumboðið, at tað helst fór at vera klárt at seta lógina í gildi í endanum av 2000.

– Eitt fjóðringsár er nú liðið, gott og væl, uttan at nøkur loysn er í ljósmála – tí hendan fyrispurning, sigur Jenis av Rana í fyrispurninginum til ríkisumboðskvinnuna.

Summardekkini
skulu aftur til arbeiðis 1. mai.

Vit eru tilreiðar við stórum úrvali av dekkum og felgum

Skifting og balansering er sjálvandi íroknað

Ring ella støkk inn á gólvið og heinta tilboð frá Gundur Hansen leiðara á dekkverkstaðnum

BERG MOTORS Dekksølan
Staravegur 1-3 · Tel. 31 35 35 · Fax 31 77 35